# Hull liðugt

**Felagið hjá Julian Johnsson er nú á 11. plássinum í triðbestu ensku deildini, og allir dreymar um uppflytan eru gjørdir til einkis**

ONGLAND
*Jákup Mørk*

Páskirnar gjørdust enn eitt dømi um, at fótbóltstilveran hjá Julian Johnsson og teimum í Hull er alt annað enn stuttlig í løtuni.

Sum vant, so hevur enskur fótbóltur fleiri umfør um páskirnar, men hóast Hull leikti tveir dystir, so eydnaðist teimum ikki at vinna sær nakað stig.

### Sannførandi skeivan vegin

Julian Johnsson var als ikki á vøllinum, tá Hull skírisdag spældi ímóti Cheltenham, og fyri umdømið hjá føroyska landsliðsleikaranum var tað kanska fult so gott, at hann ikki kom inn.

Í Hull siga tey nevnliga, at talan var um mest sannførandi avrikið hjá Huill í ár. Sannførandi á tann hátt, at eftir dystin var einki av viðhaldsfólkunum, sum ivaðist í, at hetta liðið undir ongum umstøðum kundi flyta upp.

Annars var Jan Mølby og hugdi at dystinum, sum Cheltenham vann 1-0. Stóri danin hevur verið upp á tal til at gerast nýggjur venjari í Hull, og nú hann hevur sagt starvið í Kidderminster frá sær, tykist alt benda á, at tað verður hann, sum komandi árið skal gera dreymin hjá Hull til veruleika.

Annan páskadag var Julian so aftur millum teir fyrstu ellivu, tá Darlington var mótstøðuliðið, men heldur ikki hesa ferð bar til. Darlington vann dystin 2-1, eftir at Hull miðskeiðis í seinna hálvleiki hevði javnað leiðsluna frá fyrra hálvleiki. Hetta var tó ikki nóg mikið, og nú bert fýra dystir eru eftir at spæla, munnu sjálvt heitastu viðhaldsfólkini hava slept øllum dreymum um uppflytan í hesum kappingarárinum.

# Zwolle á odda

**Eingin tykist í løtuni at vera førur fyri at steðga liðnum hjá Súna Olsen**

HOLLAND
*Jákup Mørk*

Nú tað stundar móti kappingarenda, er einki at siga til, at lagið er av tí allar besta í hollendska FC Zwolle, har Súni Olsen hevur sína dagligu gongd.

Síðani vetrarsteðgin hevur liðið enn ikki roynt at tapt nakran dyst, og góðu úrslitini hava nú lyft liðið upp á ovasta sessin í næst bestu hollendsku deildini.

### Tykist bjart

Hetta gjørdist veruleiki, tá Zwolle leygardagin var á vitjan hjá BV Veendam. Ikki ein dystur, sum varð mettur sum serliga lættur, men sum Zwolle spælir í løtuni, so er eingin, sum steðgar teimum.

Endaliga úrslitið gjørdist ein sannførandi 3-0 sigur til Zwolle. Súni Olsen er í løtuni skaddur, og fekk tí ikki sett sín dám á dystin. Í staðin var tað ein annar miðvallarunum í felagnum, Booschaart, sum við sínum ávíkavist triðja og fjórða máli í tveimum dystum, sum setti ferð á Zwolle, áðrenn innskifti Roelofsen staðfesti sigurin.

Meðan Zwolle soleiðis vann trygt, so var oddaliðið higartil – Excelsoir – alt annað enn sannførandi, tá teir høvdu torføra uppgávu á útivølli móti RBC, sum saman við Excelsoir og Zwolle stríðist um oddasessin. RBC vann tryggan 3-0 sigur, og Excelsoir, sum eitt skifti tóktist einaráðandi í deildini, er nú dottið niður á triðja plássið í deildini.

Spurningurin er so, um tað fer at eydnast Zwolle at halda fast um ovasta sessin í deildini. Á pappírinum tykist uppgávan ikki ógjørlig. Millum mótsøðuliðini í komandi dystunum eru bæði Emmen á fimta plássinum og Excelsoir, men hesir báðir dystirnir eru á heimavølli. Útidystirnir tykjast hinvegin ikki at verða eins torførir, og eru bæði tey niðastu liðini ímillum komandi mótstøðuliðini á útivølli, so alt í alt røkist fyri, at Súni Olsen gerst fyrsti føroyingurin, sum fær møguleika at spæla fótbólt í hollendsku heiðursdeildini.


# Hvar er bólturin?




Tað er ikki loyvt at kopiera henda lepe

**Gitið, hvar bólturin er, og vinnið eina ferð til stórdystin millum FCK og Brøndby**

12. mai í ár verður stórdystur í Danmark. FCK tekur tá ímóti Brøndby, og longu nú er líkt til, at hetta verður dysturin, sum ger av, hvar DM-gullið skal fara í ár.

Sum kunnugt skipa Atlantic Airways og Sosialurin fyri ferð til Keypmannahavnar í samband við dystin, og nú ber til hjá onkrum hepnum lesara at vinna sær pláss á hesi ferð.

Tað ræður snøgt sagt um at gita, hvar bólturin eigur at vera á myndini. Skrivað á lepan, í hvørjum teigi tú heldur bólturin eigur at vera, og send síðani lepan til okkara. Allir lepar við rætta svarinum verða latnir í ein pott, og hin 27. apríl fara vit at kunngera, hvør hepni vinnarin er. Um so er, at hesin longu hevur keypt sær ferðaseðil til dystin, ber sjálvandi til at fáa hendan endurgoldnan. Kappingin verður í blaðnum til og við 23. apríl. Minnist til. Jú fleiri lepar tit senda inn, størri er møguleikin fyri at gerast hepni

**Navn:** ______________________
**Bústaður:** ______________________
**Tlf:** ______________________
**Eg giti, at bólturin er í teigi:** ______________________

**Seðilin skal sendast til:**
**Sosialurin, postsmoga 76, 110 Tórshavn.**
**Merkið brævbjálvan "FCK"**

Sosialurin
ATLANTIC AIRWAYS






*Saman við liðfeløgum sínum úr B36 hevur rumenski Din Sandu fingið eina góða byrjan í kappingini um løgmanssteypið, har greipuvinnararnir longu eru mest sum vísir í at koma víðari*

Bólkur 1:

# B36 best um páskirnar

**Føroyameistararnir úr Havn fingu fýra stig burtur úr páskunum, og tykjast longu hava tryggjað sær sæti í fjórðingsfinaluni**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Sum vant, so var talan um fleiri fótbóltsdystir á páskum. Í kappingini um Løgmanssteypið skuldu sambært skránni fýra dystir spælast í hvørjum bólki. Í bólki 1 gjørdist talan tó bert um tríggjar dystir, tí ætlaði dysturin í Runavík millum NSÍ og Sumba varð útsettur.

### B36 bestu úrtøkuna

Samanumtikið var tað B36, sum slapp best frá páskunum. Javnleikurin í Runavík var so avgjørt til at liva við, og á heimavølli móti VB góvu teir tekin um, at tað kanska ikki er so øgiliga langt til meistaraspælið.

Í dystinum í Runavík var tað annars NSÍ, sum hevði tað meira spælið. Fyrri hálvleikur var so toliliga javnur, men gestirnir fingu lagt seg framum, tá rumenski Din Sandu var hægstur eftir hornaspark og stýrdi bóltinum í kassan.

Leiðslan, sum kom beint fyri hálvleik, kom sjálvandi væl við hjá heimaliðnum, men beint eftir hálvleik vórðu meistararnir álvarsliga skerdir. Hin rumenin á liðnum, Iulian Florescu, hevði í fyrra hálvleiki fingið gult kort, tá hann hevði nýtt hondina at taka bóltin við. Beint, sum seinni hálvleikur byrjaði, endurtók hann kynstri, og so var revsingin frá dómaranum náðisleys. Reytt kort, og seinastu trý korterini mátti B36 so spæla við tíggju monnum móti ellivu.

Hetta gav eitt stórt trýst til NSÍ, og fleiri málmøguleikar spurdust eisini burturúr, men annað hvørt vóru teir ikki nóg neyvir í seinastu royndini, ella stóð Rene Tórgarð fyri teimum í B36 málinum. Beint fyri leiklok eydnaðist tað tó endiliga hjá NSÍ. Heldur enn at geva sær góðar stundir ætlaði B36 at byrja eitt skjótt álop. Úrslitið varð tó, at NSÍ vann bóltin, og enn eina ferð kastaði álopsroyndin hornaspark av sær, og her megnaði Arnfinn Langgaard at fáa seinasta orðið, soleiðis at heimaliðið kundi fáa fyrsta stigið í kappingini.

Skírishósdag var eisini dystur á Krossinum í Sumba, har VB vitjaði. Her var eingin sum helst ivi um úrslitið, sum gjørdist heili 5-0 til VB.

### Ivaleyst í Gundadali

Annan páskadag skuldu sumbingar vitja í Runavík, men í fyrsta umfari varð hesin dysturin útsettur.

Soleiðis gjørdist talan bert um tann eina dystin, tá meistararnir tey bæði seinnu árini, VB og B36, hittust í Gundadali.

Úrslitið gjørdist ein tryggur 3-0 sigur til heimaliðið, og sum dysturin leið, so var tað eisini fult og heilt uppiborið. VB royndi allan dystin at dúva upp á mótálop, men tað var so sum so, hvussu stór hóttanin av hesum var. Ikki minst eftir at B36 hampuliga tíðliga kom á odda, tá Klæmint Matras stríddi seg til ein bólt, og síðini sendi inn til ein púrasta leysan John Petersen, sum við høvdinum stýrdi bóltin í netið.

B36 hevði fleiri aðrar góðar møguleikar undan steðginum, og í seinna hálvleiki helt hetta bara fram. Teir øktu eisini um leiðsluna, tá Jákup á Borg fekk sera góða tíð í brotsteiginum, og tá Magni Jacobsen stutt eftir varð rikin av vølli fyri sítt næsta gula kort, fall alt saman hjá VB.

B36 kundi tá við størri nærlagni vunnið ein væl størri sigur, men talan gjørdist bert um eitt mál afturat. Tað fekk Arnbbjørn Danielsen, sum hevði sníkt seg framvið og hegnisliga heilfluktaði ein returbólt í kassan úr 20 metra fjarstøðu.

### Tvey tykjast trygg

Sum úrslitini hava lagað seg í bólkinum, so tykist tað mest sum víst, at í øllum førum VB og B36 fara at vinna seg víðari úr bólkinum. Vanliga verður sagt, at níggju stig eru nóg mikið, til í øllum førum at koma víðari sum trýb'ari, og tá bæði liðini hava heimadyst móti Sumba til góðar, røkka tey eftir øllum at døma hesum talinum.

Tað eru runavíkingar enn ikki so vísir í, og tí verður tað í stóran mun avgerandi hjá teimum, hvussu úrtøkan verður ímóti VB og B36 í komandi dystunum. Ein sigur í øðrum av hesum dystunum skuldi verið nóg mikið, um NSÍ samstundis fær fulla úrtøku móti Sumba, men hóast sumbingar á pappírinum hava veikasta liðið í bólkinum, so hava teir áður spælt runavíkingum eitt puss í steypahøpi, og tí skal einki verða tikið fyri givið.

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

**Bólkur 1**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 3 | 2 - 1 - 0 | 6 | 2 | 4 | 7 |
| 2 | VB | 3 | 2 - 0 - 1 | 7 | 4 | 3 | 6 |
| 3 | NSÍ | 2 | 0 - 1 - 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 4 | Sumba | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 7 | -6 | 0 |

**Bólkur 2**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 3 | 2 - 1 - 0 | 6 | 2 | 4 | 7 |
| 2 | FSV | 3 | 1 - 1 - 1 | 4 | 4 | 0 | 4 |
| 3 | EB/Str. | 3 | 1 - 0 - 2 | 4 | 5 | -1 | 3 |
| 4 | TB | 3 | 1 - 0 - 2 | 3 | 6 | -3 | 3 |

**Bólkur 3**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 3 | 2 - 1 - 0 | 8 | 3 | 5 | 7 |
| 2 | KÍ | 3 | 1 - 1 - 1 | 8 | 7 | 1 | 4 |
| 3 | Skála | 3 | 1 - 0 - 2 | 4 | 7 | -3 | 3 |
| 4 | B68 | 3 | 1 - 0 - 2 | 4 | 7 | -3 | 3 |